## Fiskurin komin aftur

Fiskimenn, sum royna í Limfjørðinum, hava havt sera vánaligt fiskarí tey seinastu árini, men nú er broyting komin í. Formaðurin í fiskimannafelagnum har, Benny Andersen, sigur við DR, at bátar hava fingið nógva tungu, og at teir, sum royna eftir hummara, hava eisini havt gott fiskarí. Tey seinastu árini hevur Benny Andersen roynt eftir øðu, tí eingin fiskur var, men nú umhugsar hann at leggja umaftur, sigur hann við kringvarpið.



## Krevja størri koyrifrádrátt

Danir, sum koyra langan veg til arbeiðis, vilja nú hava størri koyrifrádrátt í skattinum, tí benzinið og oljan eru vorðin so dýr. Tey misnøgdu vísa á, at frádrátturin er ikki broyttur síðani seinasta heyst, sálvt um eitt nú dieseloljan er dýrkað 19 prosent síðani, og at tað sæst aftur hjá teimum umleið 850.000, sum koyra til og frá arbeiði hvønn dag.. Felagið hjá donskum bileigarum, FDM, tekur undir við kravinum um størri frádrátt.

# Tíggju mánaðir í fongsul fyri óviljað manndráp

**- Eg eri ómetaliga kedd av tí, sum er hent, men eg fái onki gjørt, segði ein kvinna lágmælt á málinum, beint áðrenn hon í morgun fekk dóm fyri skilaleysa koyring og óviljað manndráp, tá ið ein familjuveitsla endaði í sorgarleiki**

ÓVILJAÐ MANNDRÁP
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Ein kvinna fekk harða revsing eftir føroyskum viðurskiftum, tá ið hon varð dømd fyri óviljað manndráp, skilaleysakoyring og rúsdrekkakoyring í morgun. Áðrenn hon fekk dóm, bað hon tey, sum sita eftir um umbering.*

Tíggju mánaðir í fongsul og onki koyrikort í seks mánaðir.

Tað er prísurin, sum ein kvinnuligur bilførari skal betala fyri púra skilaleysa koyring, sum endaði við, at tvey fólk doyðu og eitt annað fólk fekk álvarligt mein.

Kvinnan sjálv meiðslaði seg so illa í vanlukkuni, at hon lá leingi á sjúkrahúsi.

Málið hevur nú verið fyri í Føroya Rætti og har kom fram, at kvinnan sjálv ikki minnist nakað frá vanlukkuni og tí kundi hon ikki taka støðu til um hon var sek ella ikki.

Tá ið blóðroynd varð tikin av henni, hevði hon 1,5 promillu í blóðinum, tá ið vanlukkan hendi.

Kvinnan var ákærd fyri óviljað manndráp, skilaleysa koyring, rúsdrekkakoyring og fleiri onnur lógarbrot í sambandi við hesa ferðsluvanlukkuna, sum hendi á Sandvíkahjalla.

Í hesum sambandi varð hon eisini ákærd fyri at sett lív og heilsu hjá fleiri fólkum í vanda, umframt tey, sum doyðu.

Tað gjørdi hon við fyriliturleysari yvirhálingum og skilaleysari koyring annars.

Kvinnan var á veg norður eftir Hvítanesvegnum, men vitni hava greitt frá, at hon koyrdi sikk-sakk og hon yvirhálaði ein bil høgrumegin og ein annan vinstrumegin, men tá rendi hon beint á ein bil, sum kom suðureftir.

Eini hjún í suðurgangandi bilinum doyði og ein vaksin abbasonur, sum eisini var í bilinum, fekk so álvarsligan skaða, at tað síðani hevur verið tórført hjá honum at røkja arbeiðið.

Tey trý fólkini vóru á veg til Havnar í familjuveitslu, tá ið vanlukkan rakti tey.

### Kravdi 10 mánaðir

Tað er óvist hvat tað var, sum fekk kvinnuna at koyra so fullkomiliga skilaleyst, men vitni høvdu sæð hana niðri í býnum í stórari sinnisrørslu, har hon sat í bilinum og floytaði og dukaði nevarnar niður í róðrið.

- Tað var týðiligt, at hon var sinnisrørd, helt ákærin

### Kravdi 10 mánaðir

Ákærin vísti á álvarsemi í málinum og helt, at ein hóskandi revsing var at døma kvinnuna fongsul í 10 mánaðir og at missa koyrikortið í seks ár.

Ákærin helt ikki, at tað eigur at føra mildari revsing við sær, at bilførarin sjálv meiðslaði seg illa í vanlukkuni.

Verjin helt at tað var nakað hart at døma hana 10 mánaðir í fongsul og at missa koyrikortið í seks ár, tí hann metti, at helvtin av hesum var ivaleyst.

Verjin helt, at tað eigur eisini at koma henni til góðar, at hon ongantíð áður er revsað. Og so helt hann eisini, at kvinnan longu varð revsað nóg mikið og at hon verður revsað restina av lívinum.

Men dómarin gav ákæranum fult viðhald í sínum kravi og dømdi kvinnuna eftir tí.

Hann helt, at tær álvarsligu avleiðingarnar av vanlukkuni átti at síggjast aftur í revsingini.

Áðrenn dómarin tók støðu í málinum, fekk ákærda høvi at taka orðið, men hon fekk ikki sagt so nógv.

Lágmælt á málinum fortaldi hon familjuni hjá teimum, sum lótu lív, at hon var ómetaliga kedd av tí, sum varð hent

- Men eg fái onki sagt og eg fái onki gjørt, legði hon afturat.

Seinni skal so støða takast til um kvinnuligi bilførarin eisini skal betala endurgjald fyri vanlukkuna.

# Sandoyingar fáa kanska pendulfart

**Nú verður arbeitt við eini ætlan um at seta Ternuna í sigling um Skopunarfjørð afturat Teistanum**

STRANDFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú fáa sandoyingar kanska betri ferðasamband.

Í øllum førum er tankin farin at spøkja í politisku skipanini um at seta strandfaraskipið Ternuna í sigling ímillum Gomlu Rætt og Skopun afturat Teistanum.

Sandoyingar hava ferð eftir ferð fýlst á, hvussu long bíðitíðin er at sleppa við Teistanum, tí hann nøktar verri enn so tørvin á tí stríða streymi av ferðafólki, bilum og farmi, sum er um Skopunarfjørð.

Tað er so galið, at sandoyingar hava sagt, at teir noyðast mangan oman á ferjuleguna við morgunmatinum í hondini í tímar áðrenn Teistin siglur, fyri at tryggja sær pláss og ein bíðitíð upp á tveir, tríggjar tímar, ella meir, er ikki óvanlig.

Og tað halda teir ikki er hóskandi, nú vit eru farin um gáttina til 21. øld.

Tað er eisini ein høvuðsgrundgeving fyri at fáa undirsjóvartunnil, tí teir siga, at vánaliga ferðasambandið forðar fyri menningini í oynni.

Men nú kannar politiski myndugleikin so møguleikan at seta Ternuna í siglingina afturat Teistanum.

Strandferðslan hevur roknað út, at tað kostar góðar 600.000 krónur um mánaðin at seta Ternuna í sigling um Skopunarfjørð og fyri ta upphæddina fáast sjey túrar afturat úr Skopun um dagin og sjey túrar afturat av Gomlurætt afturat teimum níggju túrunum, sum nú eru yrkadagar.

Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í lógmálum staðfestir, at sum er, hevur hon ikki fígging til at seta Ternuna í sigling, so skal nakað henda á hesum øki, má Løgtingið játta peningin og tað fáa vit onki at vita um, fyrrenn Løgtingið hevur samtykt fíggjarlógina.

Spurningurin er eisini, hvussu leingi Løgtingið vil játta pening til Ternuna og um hon sostatt skal sigla alt árið, ella um tað bara vera í summarmánaðunum.

Helena Dam á Neystabø sigur eisini, at kann verður eftir, hvussu ferðslumynstrið er um Skopunarfjørð og endamálið við tí er at vita, um tað ikki ber til at javna flutningin av farmi soleiðis, at Teistin verður betri útnyttaður og so at farmurin ikki trokar seg saman um einstakar fráferðir við teirri avleiðing, at bilar koma at standa eftir.